STARVSMANNAFELAGIÐ

# Kunningarráðgevi til Starvsmannafelagið

Starvsmannafelagið skal vera sjónligari í almenna rúminum, tí er starv sum kunningarráðgevi leyst at søkja.
Viðkomandi skal, umframt at vera partur av dagligu umsitingini, hava ábyrgd fyri kunning felagsins á neti og í miðlum, og virka sum ráðgevi hjá talsfólkum felagsins.

**Rætta fólkið skal:**

- hava royndir og/ella útbúgving innan kunning og marknaðarføring
- hava politiskt innlit og áhuga fyri samfelagsspurningum, serliga arbeiðsmarknaðarmálum
- vera lýtaleys/ur í skrift og talu á føroyskum, donskum/skandinaviskum og enskum
- vera stinnur teldubrúkari, serliga innan netmiðlan

Starvið er 2/3 tíð, og lønin er sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Selmu Ellingsgaard, forkvinnu, tlf. 214868. Umsóknarfreistin er 26. apríl 2011.

**Send umsókn við møguligum skjølum til:**

**STARVSMANNAFELAGIÐ**
J. H. Schrøtersgøta 9
Postboks 165
110 Tórshavn

RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Leiðari til Dagrøktina í Runavík

Í Dagrøktini í Runavík ganga í løtuni 62 børn, hjá 17 dagrøktarum. Dagrøktin er væl skipað við spælistovum, spælistvufólkið og við tveimum økispedagogum. Eftir summarfrítíðina minkar dagrøktin við 5 dagrøktarum og 1 økispedagogið, í samband við liðugtgerð av Barnahúsinum Sellin á Skála.

Vit søknast eftir námsfrøðingi við áhuga fyri dagrøkt, sum sær tað sum eina avbjóðing at taka leiðsluna av pedagogisku menninginni av dagrøktini, umframt fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrdina.

**Umráðandi er at umsøkjarin:**

- er útbúgvin námsfrøðingur og hevur leiðsluroyndir
- hevur góð samstarvsevni
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, lønt eftir lønarstigi 26 til 32.

Nærri fæst at vita um starvið, við ar venda sær til Jákup H. Foldbo, sosisldeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Runavíkar kommunu í hendi 22.04.2011.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

**Runavíkar kommuna**

Heiðavegur 26 · Postsmoga 139 · FO-600 Saltangar

INPACT

## BÓKHALDARI

Fyri ein av kundum okkara í Suðuroy verður hervið søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber. Talan er um 1/2 ella 3/4 tíðarstarv.

**Høvuðsuppgávan:**
Tann, sum settur verður í starv kemur at hava ábyrgdina av bókhaldinum. Virksemið umfatar rakstur av fiskiskipum. Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir avrokning av hýrum. Arbeitt verður við bókhaldsskipanini Lundin, herundir avrokningarskipanini til hýruavrokning.

**Førleikakrøv:**
Ongar serligar treytir verða settar til útbúgving, men umsøkjarar við hesum royndum hava fyrimun :

- Royndir at arbeiða við bókhaldsskipanini Lundanum og avrokningarskipanini
- Góðan kunnleika í nýtslu av kunningartøkni
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanartreytir:**
Starvstreytirnar verða ásettar eftir avtalu millum tann, sum verður settur og leiðsluna.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
Stílað: Fróði Sivertsen
Postrúm 191
FO-110 Tórshavn
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. apríl 2011.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Fróða Sivertsen, statsaut. revisor, Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT. tlf. nr. 554725 ella teldupostadr.: fs@inpact.fo

